| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. januar2015 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2015 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2015 tann 29. januar kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. Januar 2015 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2015.**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2014.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá fyrisitingini, dagfest 22. januar 2015 saman við grannskoðaðum til roknskap fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2014 frá "Januar – løggilt grannskoðaravirki" saman við grannskoðarafrágreiðing fyri bókasavnið.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 773.579,30** móti mettum kr. 863.000,00. Sostatt eru kr. 89.420,70 minni nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 18.161,78 lægri enn mett, og er her talan um minni nýtslu av lønum til bókasavnshjálparar. Býráðið setti tann 01. mai 2011 nýggjan bókavørð við útbúgving í starv, og at lønin hjá hesum er væl hægri flokkað enn fyribilsstarv hjá bókavørði uttan útbúgving, og tí varð avsetingin fyri 2011 ov lág. Hetta er nú komið í rættlag fyri bæði 2012, 2013 og 2014.

Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 55.997,51 lægri enn mett, eitt nú grundað á at ljós og hiti hevur havt eina lægri útreiðslu upp á kr. 8.424,08,10, meting kr. 47.000,00 brúkt kr. 38.575,92. Eisini er staðfest ein minninýtsla fyri umvælingar upp á kr. 50.965,84, mett kr. 75.000,00 nýttar kr. 24.034,16. Tó er meirinýtsla upp á kr. 3.240,15 fyri skattir og tryggingar og reingerð. Mett kr. 2.400,00, brúkt kr. 5.640,15. Útreiðslur til bókakeyp og innbinding hava verið kr. 29.201,18 lægri enn mett, við tað at metinin varð kr. 133.000,00, meðan staðfesta nýtslan hevur verið kr. 103.798,82.

Aðrar útreiðslur hava verið kr. 18.589,77 hægri enn mett. Hækkingin stavar frá meiriútreiðslum í sambandi við keypi av teldu vm. Avsettar vórðu kr. 122.600,00 í fíggjarætlanini, meðan nýtslan hevur verið kr. 141.189,77.

Inntøkurnar hava verið kr. 136.018,00 í landskassastuðli móti mettum kr. 345.200,00, t.v.s. kr. 209.182,00 minni enn mett, og hevur kommunan sostatt borðið restina av kostnaðinum – inntøkur upp á kr. 3.555,60,00 ella 630.450,70.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstrarætlan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstrarætlanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2013 er grundaður á rakstrarætlanina fyri 2014. Sambært rakstrarætlanina fyri 2014 varð roknað við einum kostnaði upp á kr. 863.000,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi landskassastuðulin verið kr. 345.200,40 men sambært skrivi frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum hetta skuldi givið kommununi kr. 192.000,00, men eru játtanin eftir hetta lækkað niðan í kr. 136.018 ella við kr. 55.982,00.

Víst verður eisini til skriv frá Søvnum landsins, dagfest 27. mai 2014, at góðkend rakstrarætlan fyri bókasavnið fyri 2014 er kr. 425.056,00, harav ætlað stuðulsveiting er kr. 170.022,00, og at forskotsútgjaldingin er 80% ella kr. 136.018,00. Henda upphædd er júst tann, sum útgoldin er í 2014, men sambært skrivinum resta sostatt kr. 34.004,00 í at fáa játtaðu kr. 170.022,00. Sostatt er góðkenda

fíggjarætlanin teirra vegna kr. 425.056,00, so útgoldna stuðulsveitingin í 2014 varð bert 136.018,00 svarandi til 17,60%. Sostatt verður kommunan at rinda 82,4% ella kr. 634.005,70.

Sostatt er einki sum helst lutfall millum tey 40%-ini hjá landskassanum og tey 60%-ini hjá kommunukassanum. Við tí støði, sum Søvn landsins hava lagt undir raksturin av bókasavninum, so skal hesin bert verða kr.425.056,00 ella eina slaka ½ av tí, sum býráðið annars hevur tikið avgerðir um fyri 2014.

Roknskapurin 2014 vísir, at kr. 209.182,00 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%, so er býtið 60>40% er ikki í lagi. Sambært roknskapinum er hetta 82>18%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 23. januar 2015, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2014 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna grannskoðaða roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2014 uttan viðmerkingar. (9-0).

## <u>Mál nr. 02/2015.</u>

### Almenn hoyring av lógaruppskotum um løgtingsvallóg og kommunuvallóg.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Almannamálaráðnum, dagfest 02. januar 2015, hvar greitt verður frá, at í mong ár hevur verið tørvur at dagføra løgtingsvallógina og kommunuvallógina, og tí verða í hesum sambandi sent tvey lógaruppskot út til almenna hoyring.

Talan er um "uppskot til løgtingslóg um val til Løgtingið" og "uppskot til løgtingslóg um val til kommunur". Núverandi lógir eru frá ávikavist 1978 og 1972 við seinni broytingum.

Skotið verður upp, at minsta støddir av valstaði verður lækkað til 100 veljarar, og er teirra metan, at ídag kann spurnartekin verða sett við, um grundleggjandi rætturin til at atkvøða loyniligt, er tryggjaður í galdandi vallógum.

Somuleiðis verður skotið upp at víðka rættin at greiða brævatkvøðu, soleiðis at ein og hvør, sum ynskir at greiða brævatkvøðu kann gera tað, uttan mun til, um tað ber til at møta á valstaðnum valdagin ella ikki. Skotið verður eisini upp, at brævatkvøður telja við, um tær eru komnar á valstaðið, áðrenn atkvøðugreiðslan endar.

Mett verður, at galdandi løgtings- og kommunuvallógir hava sera ymiskan bygnað, sum ger tær tungar at umsita. Endamálið við lógaruppskotunum er fyrst og fremst at dagføra lógirnar, soleiðis at tær bygnaðarliga líkjast meira hvørji aðrari og verða lættari at skilja og umsita. Samstundis verða fleiri av ásetingunum í lógunum dagførdar og tillagaðar – bæði málsliga, innihaldsliga og tøkniliga.

Freistin fyri at gera viðmerkingar til lógaruppskotini varð sett til 26. januar 2015. Skipað varð fyri hoyringsfundi í Havn tann 16. januar 2015, men okkara vegna møtti bert Tr4eji á Lakjuni, kommunuvalnevndarformaður fyri Fuglafjarðar valdømi, sum varð staddur í Havn. Hvørki løgtingsvalnevndarformaðurin fyri Fuglafjarðar- og Hellunnar valdømi og umboð fyri fyrisitingina møttu, vegna sera vánalig koyrilíkindi, har ikki var framkomandi til Havnar.

Málið hevur verið til viðgerðar á starvsbólka- og stýrisfundi í Kommunufelagnum, og har staðfest er, at ikki verður tikið undir við at lækka talið av veljarum, soleiðis at smá valstøð niðan fyri 100 veljarar verða niðurløgd. Mett verður, at hetta er ein spurningur millum avvarðandi bý-bygdaráð og teimum staðbundnu nevndunum, um eitt valstað skal verða niðurlagt ella ikki, ella um bygdafólkið ikki skal verða hoyrt áðrenn.

Kommunan hevur móttikið uppskot frá kommunufelagnum, dagfest 29. januar 2015 til svarskriv til Almannamálaráðið til viðmerkingar til lógaruppskotini.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við viðmerkingunum frá Kommunufelagnum, dagfestar 29. januar 2015, ið sendar eru Almannamálaráðnum til lógaruppskotini um val til Løgtingið og um val til kommunur. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.35.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen